UTTAN ÚR HEIMI

## Kanna norska laksin

Herfyri gjørdu russisku myndugleikarnir av at steðga laksainnflutninginum úr Noregi, tí sambært kanningum eru ov nógv blýggj og kadmium í norska laksinum.

Nú hava myndugleikarnir í Singapore boðað norðmonnum frá, at teir ætla sær eisini at kanna laksin, sum kemur úr Noregi. Heilsumyndugleikarnir í Singapore siga, at teir plaga at kanna norskan laks, men at kanningarnar hava ikki umfatað evni sum blýggj og kadmium, men tað verður nú kannað eisini.

Møgulig tiltøk í Singapore fáa kortini ikki stórvegis ávirkan á norsku laksavinnuna. Sambært útflutningsráðnum í Oslo fóru 1.633 tons av norskum laksi til Singapore ellibu teir fyrstu mánaðarnar í ár, og tað var á leið tað sama sum í sama tíðarskeiði í fjør. Harafturímóti hevur russiska innflutningsbannið stórar avleiðingar. Eitt nú hevur ein fyritøka í Bømlø boðað frá, at hon noyðist at siga 100 fólkum úr starvi, verður ósemjan við russar ikki loyst.

Norsku myndugleikarnir siga, at teir skilja ikki russisku avgerðina um innflutningsbann, tí eftir teirra tykki er norski laksurin als ikki vandamikil at eta.



*Russar siga seg hava funnið ov nógv blýggj og kadmium í norskum laksi.*

## Rithøvundur hóttur

Myndugleikarnir í Turkalandi hótta nú við at draga rithøvundin Orhan Pamuk fyri rættin, tí hann eftir teirra tykki hevur tosað ov niðurlátandi um tann turkiska herin.

Upprunin til málið er ein samrøða, sum týska blaðið Die Welt hevur havt við Pamuk. har hann vil vera við, at herurin í Turkalandi mótarbeiðir teimum politisku royndunum at demokratisera landið. Hetta er ikki fyrstu ferð, at myndugleikarnir eru misnøgdir við orðalagið hjá Pamuk. Herfyri varð hann stevndur, tí hann hevði sagt, at turkisku myndugleikarnir tora ikki at tosa um hópmorðið á meiri enn eina millión armenar næstseinasta aldarskiftið, og at turkiski herurin hevur beint fyri fleiri túsund kurdum seinnu árini.

Tann 53 ára gamli Orhan Pamuk hevur fleiri ferðir verið nevndur sum møguligur Nobelvinnari í bókmentum, og tað hevur vakt stóran ans nógvastaðni, at turkisku myndugleikarnir aftur hótta við at draga hann fyri rættin.

- Hetta er sera álvarssamt. Turkaland stríðist fyri at sannføra onnur um, at landið hevur talifrælsi, men fleiri rithøvundar og útgevarar verða hóttir við fongsulsrevsing, siga teir sína hugsan, sigur Kjell Olaf Jensen hjá norska felagsskapinum PEN við Dagbladet.

## Tosa tvørtur um markið

Fyri fyrstu ferð í 60 ár kunnu fyritøkur í Suðurkorea tosa í telefon við fólk hinumegin markið ímillum tey bæði koreonsku londini. Alt telefonsamband bleiv kvett, tá sovjetskir hermenn hersettu tann norðara partin av Korea í 1945.

Sambandið verður roknað sum ein byrjan, og møguleikarnir eru eisini rættiliga avmarkaðir, tí tær suðurkoreonsku fyritøkurnar kunnu bara tosa við fólk og fyritøkur í norðurkoreanska býnum Kaesong.

Suðurkoreanski ráðharrin í samskiftismálum sigur, at hansara stjórn fer at virka fyri, at vanligt telefonsamband verður ímillum londini bæði. Hann leggur afturat, at royndin við sambandinum við Kaesong hevur longu víst, at tørvur er á fleiri møguleikum.



*Fyri fyrstu ferð síðani 1945 ber til at tosa í telefon tvørtur um markið ímillum tey bæði koreonsku londini.*



*Soleiðis sá út í Danmark gjáramorgunin*

*Mynd: Reuters*

# Veturin komin í Evropa

**Í Mið- og Vesturevropa eru nógvir vegir stongdir av kava, í Svøríki er bæði vindur og kavi, og í Turkalandi er bítandi kalt**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Veturin hevur lagt at kalla alt Evropa undir í kava, og sambært veðurmonnunum kunnu tey flestu rokna við, at kavin verður liggjandi inn í tað nýggja árið.

Í Danmark, Noregi og Svøríki hevur ferðslan verið nógv darvað av kava, og fleiri ferðsluóhapp hava verið. Í Svøríki hevur harafturat verið rættiliga nógvur vindur, og í gjár ávaraðu myndugleikarnir fólk ímóti óneyðugari koyring. Í pørtum av Skåne var vindmegin oman fyri 20 metrar um sekundið, og løgreglan stúrdi fyri, at elsteyrar kundu detta út á vegirnar. Í Danmark máttu akfør hjá herinum hjálpa sjúkrabilum ígjøgnum kavan, og nógvastaðni bað løgreglan fólk halda seg innandura og lata bilin standa.

Í Fraklandi, Týsklandi, Bretlandi og Pólandi er nógvur kavi komin niður, og í Eysturríki, norðara parti av Italia og í Kekkia hava kavi og vindur seinkað allari ferðslu nógv. Í Fraklandi stóðu nógvir bilar fastir í kavanum, og fleiri fólk noyddust at sova í bilinum næstsíðstu nátt. Í Kekkia stoyttu fýra lastbilar saman á einum av teimum týdningarmestu motorvegunum, og tað elvdi til ruðuleika í ferðsluni.

Í Turkalandi hevur tað verið bítandi kalt. Í gjár varð sagt, at í fjallalendinum í landspartinum Agri har eysturi í landinum vóru 31 kuldastig, og at fýra fólk vóru deyð í kulda. Umleið 1.000 bygdir høvdu einki samband við umheimin.

# Bob Geldof politiskur ráðgevi

**Kendi tónleikarin skal hjálpa konservativa flokkinum í Bretlandi at legggja eina politiska ætlan um altjóðaagerð og bardagan ímóti altjóða fátækradømi**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Nú verður Bob Geldof ráðgevi hjá konservativa andstøðuflokkinum í Bretlandi*

Nývaldi formaðurin hjá konservativa flokkinum í Bretlandi, David Cameron, gongur nýggjar leiðir í royndunum at vinna tað næsta parlamentsvalið. Hann hevur sett ein arbeiðsbólk at stinga út í kortið, hvørja leið flokkurin skal taka, tá tað snýr seg um altjóðaagerð og fátækradømi, og ráðgevi hjá arbeiðsbólkinum er eingin annar enn tann kenda írska rockstjørnan Bob Geldof.

Sambært BBC er eingin ivi um, at David Cameron hevur gjørt eitt satt kvetti, nú havv hevur fingið tann væl umrókta Geldof at hjálpa sær, tí írin hevur drúgvar royndir í stríðnum ímóti fátækradømi kring heimin. Hann var høvuðsmaðurin aftan fyri Live-Aid átakið og ein av oddamonnunum aftan fyri Live 8-tiltakið, sum bleiv skipað í sambandi við toppfundin hjá G8-londunum í Skotlandi í summar.

David Cameron sigur við BBC, at konservativi flokkurin ætlar sær at koma við einum munagóðum íkasti til orðaskiftið um altjóðagerð og fátækradømi. Harafturat er ætlanin at gera eitt uppskot um, hvønn politikk Bretland eigur at reka mótvegis Heimsbankanum, Altjóða Gjaldoyragrunninum og øðrum altjóða felagsskapum og stovnum.

-Arbeiðsbólkurin skal koma við nýggjum hugskotum um, hvussu vit kunnu geva teimum fátæku londunum fleiri bein at standa á, sigur David Cameron, sum ikki dylur fyri, at hann er sera fegin um at hava fingið Bob Geldof til ráðgeva.